# Flogbólturin byrjar

**Flogbóltslandskappingin hjá bæði monnum og kvinnum fer ígongd um vikuskiftið, og spennandi verður at síggja, hvussu styrkin hjá ymsu liðunum er**

FLOGBÓLTUR



*Bæði Fram og ÍF skulu í ár byggja nakað nýtt upp eftir frágongd frá árinum í fjør, men roknað verður tó við, at fuglfirðingarnir eru teir við sterkara liðnum*

Fram er í fer við at byggja eitt nýtt lið upp, og liðið endaði á aftasta plássinum í FK-kappingini, meðan ÍF endaði í finaluni. ÍF hevur mist Rúna Weihe, sum er farin á skúla í Tromsø, og leikar við norsku elitudivisiónini, men liðið skuldi framvegis havt styrki til at vunni á Fram, við monnum sum Boban, Odd og Bartali Elisasen á liðnum.

Fleyr hevur seinasta árið arbeitt við styrkja um yngru leikararnar á liðnum, og verður tað í ár, at teir skulu vísa sína styrki. Mjølnir hevur tveir útlendingar á liðnum, harav Stan eisini leikti seinasta ár, meðan liðið hevur fingið tilgongd av einum nýggjum leikara í ár. Tað er tó enn óvist, um hesir leika um vikuskifti.

Mett verður, at við tveimum útlendingum á liðnum, verður Mjølnir eitt lið sum uttan iva kemur at býta frá sær í toppinum í ár.

### Skert ÍF-lið

Í meistaradeildini hjá kvinnum skulu føroyameistararnir ÍF til Havnar at leika ímóti KÍF, og kann hetta gerast ein sera áhugaverdur dystur. Liðini møttust í FK-kappingini seinasta vikuskifti, og tá eydnaðist tað KÍF at vinna dystin 2-1.

ÍF liðið hevur í mun til seinasta ár mist Ninu Alter av liðnum, og eisini var liðið so óheppið seinasta vikuskiftið, at hevarin Randi Larsen fekk ein skaða í knæði, og tað var ivasamt um hon fekk leikt hetta vikuskiftið. Í mun til liðið seinasta ár, er Rønn Eliasen heldur ikki við í ár.

KÍF hevur harafturímóti styrkt sær um liðið við einum kanadiskum leikara, umframt at ein dani er komin á liðið. Kanadiski leikarin hevði seinasta vikuskiftið ein stóran leiklut í at liðið kom í finaluna í FK-kappingini, so tað verður uttan iva hon sum skal taka eitt tungt tak um vikuskiftið, um tað skal eydnast KÍF at vinna á føroyameistaraum.

Steypavinnararnir frá í fjør skulu í fyrsta dystinum til Giljanes at leika ímóti Drátti. Tb prógvaði longu seinasta sunnudag, at liðið aftur í ár ætlar at liggja í toppinum, nú tær ongu hava megna at leikt seg í steypafinaluna.

Stóri styrkurin hjá TB eru Gudrid Nolsø og báðar Popovic-systrarnar. Landsliðsleikarin Ingun Midjord var ikki við í FK-kappingini vegna lestrarørindi, og ikki er greitt í løtuni um hon verður við um vikuskiftið.

Um støði skal takast í seinasta vikuskifti, so fær Dráttur ein stravnan dyst um vikuskiftið, um ikki m.a. landsliðsleikararnir Herborg á Mýruni og Sólgerð Henriksen leika upp til sítt besta.

Nina Alter, sum er givin í ÍF, skal møguliga leika við Drátti í vetur, men ikki er greitt nær hon leikar sín fysta dyst. Við Ninu á liðnum, kann Dráttur gerast ein álvarslig hóttan fyri hini liðini í deildini.

Mjølnir megnaði ikki at koma í semifinaluna í FK kappingini, men tað megnaði Fleyr harafturímóti, men liðini leiktu tó ikki ímóti hvørjum øðrum, so trupult er at siga hvør favoritturin er til henda dystin.

Fleyr hevur í ár fingið tilgongd av Hjørdis Mortensen, sum m.a. hevur verið við á landsliðnum, og sum var ein av hornasteinunum í gull-siðrunum á Gotlandi og Isle of Man, og verður hon ein tíðandi leikari í Klaksvík, um tað skel eydnast Fleyr at vinna.

Men Mjølnir eru altíð sterkar á heimavølli, og um spæliviðurskifini hjá útlendska lekaranum hjá Mjølni verða í lagi um vikuskiftið, so verður hetta ein stórur styrkur saman við landsliðsleikarunum Annu Müller Jacobsen, Marjun Kalsø og Margir G. Joensen.

# Brak í Havn

**Stórdysturin hetta vikuskiftið er uttan iva millum Kyndil og StÍF, men í øllum trimum førum kann roknast við spennandi uppgerðum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tríggir dystir verða hjá monnunum um vikuskiftið. Felags fyri teir allar er, at teir verða leiktir klokkan 16.00 sunnudagin, og at talan í øllum trimum førum tykist um sera spennandi uppgerðir.

Í Havn verður talan um dyst millum gull- og silvurvinnararnar frá í fjør, tá StÍF kemur á vitjan hjá Kyndli. Bara tað borgar í sjálvum sær fyri eina spennandi uppgerð, og so plagar talan vanliga at vera um undirhaldandi dystir, tá hesi bæði liðini hittast. Bæði hava tey hug at spæla kvikan hondbólt, og so er spurningurin bara, hvør er kvikari á degnum.

Enn hevur StÍF ikki verið í landskappingardysti, men hóast hetta, so er lítið at ivast í, at liðið aftur í ár fer at teljast millum tey sterkastu. Tað ætlar Kyndil helst eisini at gera, men so mugu teir í øllum førum ansa sær, at talan ikki verður um býttislig mistøk, soleiðis sum tá teir seinastu vikuskifti tveittu trivaliga leiðslu burtur í grannauppgerðini móti Neistanum.

### Er stríðsviljin nokk

Tað ferðin fekk Neistin bjargað sær eitt stig, og tað er einki at ivast í, at teir eru fegnir, um hetta aftur eydnast sunnudagin. Nú gongur leiðin nevnliga til Vestmanna, og har er einki at ivast í, at VÍF ætlar sær alt. Eftir vónbrotið við bronsumerkjum í fjør er kósin av nýggjum sett móti gullinum, og so er spurningurin, um stríðsviljin hjá Neistanum er nóg mikið at forða hesum.

Í Hoyvíkarhøllini verður dystur millum sambúgvarnar báðar, KÍF og H71. Kollfirðingar vóru ikki í dysti seinasta vikuskifti, tá H71 tapti greitt fyri VÍF, og tí verður talan um eina uppgerð, sum kanska fyrst og fremst fer at vísa, hvar liðini flóta í ár.

Hvussu er og ikki, so tykjast útlit eisini her at vera fyri eini spennandi uppgerð.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | mál | vunnin mál | tapt munur | mál- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 53 | 35 | 18 | 4 |
| 2 Stjørnan | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 48 | 34 | 14 | 3 |
| 3 Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 54 | 40 | 14 | 2 |
| 4 VÍF | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 35 | 38 | -3 | 2 |
| 5 StÍF | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 23 | 23 | 0 | 1 |
| 6 Søljan | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 13 | 21 | -8 | 0 |
| 7 Kyndil | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 23 | 58 | -35 | 0 |

**1. Deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | mál | vunnin mál | tapt munur | mál- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 1 | 1 | - | 0 | - | 0 | 32 | 24 | 8 | 2 |
| 2 Kyndil | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 32 | 32 | 0 | 1 |
| 3 Neistin | 1 | 0 | - | 1 | - | 0 | 32 | 32 | 0 | 1 |
| 4 StÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 KÍF | 0 | 0 | - | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 H71 | 1 | 0 | - | 0 | - | 1 | 24 | 32 | -8 | 0 |



# Spennandi FS-stevna

**Havnar Svimijfelag togaði seg fram um hini í spennandi svimjikapping í Fuglafirði**




*Svimjara starta*

Um vikuskiftið var Havnar Svimjifelag í harðari kapping við Fuglafjarðar Svimjifelag um fyrsta plássið í árligu FS-stevnuni, sum varð hildin í Fuglafirði. Kappingin var fyri svimjarar í bólkunum 1, 2 og 3 og stillaðu feløgini upp við heili 170 svimjarum úr øllum landinum.

Bólkur 1, sum eru yngru svimjararnir, sluppu fyrst fram at startskamlinum fríggjakvøldið. Ikki var tað tann stóra kappingin í hesum bólkinum og vórðu tað tískil mest sum teir somu svimjararnir, sum settu navn til fyrsta plássið í ymisku kappingunum.

Fuglafjarðar Svimjifelag lá klárt á odda eftir kappingina fríggjakvøldið við heili 8 gullheiðursmerkjum og var langt niður til Flot og Havnar Svimjifelag, sum við ávikavist einum gullheiðursmerki í part, lógu sum nummar tvey.

Vend kom í leygarmorgunin. Serliga vóru tað svimjararnir í bólki 2, sum gjørdu hálið fyri Havnar Svimjifelag tíðliga leygarmorgunin og ikki var til at basa kúluni, fyrst hon var skotin.

Havnar Svimjifelag tók seg klárt fram um í hesum bólkinum og eftir at hava fingið blóð á tonnina, varð punktum harvið sett við kappingina.

Við 10 gullheiðursmerkjum í bólki 2 gekk tað bara tann eina vegin og hóast Flot, Skeggjar og Fuglafjarðar Svimjifelag vóru einaráðandi í bólki trý, høvdu havnarfólkini longu tikið seg so mikið fram um, at ikki var til at taka seg fram um tey aftur.



*Poula Mohr FS vann 6 gull*



*Pauli Mohr FS vann 3gull*

**Samlaða úrslitið gjørdist:**

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Nr. 1 Havnar Svimjifelag | 12 | 6 | 9 |
| Nr. 2 Fuglafjarðar Svimjifelag | 10 | 2 | 2 |
| Nr. 3 Skeggjar | 5 | 4 | 1 |
| Nr. 4 Flot | 4 | 6 | 5 |
| Nr. 5 Tvøroyrar Svimjifelag | 1 | 6 | 6 |
| Nr. 6 Reki | 1 | 5 | 4 |
| Nr. 7 Vágs Svimjifelag | 1 | 2 | 1 |
| Nr. 8 Ægir | 0 | 0 | 2 |



*Hildur á Fløtti HS vann 3gull*



*Elspa Mørkøre Skeggjar vann 5gull*